# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Bónus á Glyvrum:

## Gevur bonus at arbeiða hjá Bónus

**Í tíðarskeiðnum 13. mai-8. desember 2003 áttu fimm av starvsfólkunum á Bónus á Glyvrum hvør sítt barn**

Í handlinum eru í dag tilsamans átta starvsfólk. Eitt tíðarskeið í fjør vóru sjey fólk til arbeiðis, harav fimm vóru við barn, sigur Fríðbjørg Ljósá, sum er leiðari á Bónus á Glyvrum.



*Bónus mammur við børnum: f.v. Mariann Rasmussen við soninum Dávid R. Rasmussen, f. 13. mai 2003, Kristina N. Hansen við soninum Filip N. Hansen, f. 14. juli 2003, Eyðbritt Petersen við soninum Sverra Danielsen, f. 31. august 2003, Jannie Olsen við dóttrini Randi D. Olsen, f. 20. november 2003, og Andrea Johansen við soninum Martin Johansen, f. 8. desember 2003*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hans Jacob Mellemgaard 70 ár



Leygardagin 14. februar fór Hans Jacob Mellemgaard í Klaksvík um tey sjeyti. Hann hevur í meiri enn eina hálva øld verið sjómaður. Mesta partin av tíðini hevur hann verið í langfarasigling.

Hans Jacob er svínoyingur. Foreldrini vóru Ingrid og Henry Mellemgaard. Ingrid var dóttur Ingu og Símun Júst Jacobsen, og Henry var sonur Martu og Jacob uppi á Heygum, sum svínoyingar nevndu hann.

Ingrid og Henry bygdu norðuri á Geilaliði, og tey fingu fimm dreingir. Hans Jacob var elstur, og hinir vóru Símun Júst, Jarvin, Dánial og Árnmar. Símun Júst býr í Havnini, Dánial í Keypmannahavn og Árnmar á Argjum. Jarvin búði niðri, men hann doyði í 1968 bert 30 ára gamalur.

Hans Jacob var blaðungur, tá ið hann fór til skips. Hann var eitt nú við Kelduni hjá Jens Klæminti Isaksen, sum pápin førdi. Hann var við trolaranum Nólsoyar Pálli, sum Hansemann hjá Jens Klæminti førdi, við Coraliu og Carlton, sum Jógvan hjá Jóan Jakku á Viðareiði førdi, og við Svínoyar Bjarna, sum pápin, Henry Mellemgaard, førdi. Eftir at Hans Jacob í 1953 hevði tikið skiparaprógv, var hann ofta bestimaður.

Í 1959 tók Hans Jacob stýrimansprógv, eftir at hann hevði gingið upp á skúla í Klaksvík, og síðani fór hann út av sigla. Í 1964 leyk hann skipsføraraprógv í Havnini.

Hans Jacob sigldi í reiðarínum hjá J. Lauritzen. Har var hann leingi, og reiðaríið legði støðugt størri ábyrgd á hann. Í 1967 gjørdist hann yvirstýrimaður, og tá ið hann fall fyri aldursmarkinum hjá Lauritzen og mynstraði av fyri tíggju árum síðani, hevði hann í mong ár verið kapteynur og siglt á mest sum øllum rutunum hjá reiðarínum.

Hans Jacob er ættkærur og trúfastur, og hann er áhugaverdur at koma í prát við. Hann hevur upplivað so nógv tey mongu árini, hann sigldi á heimshøvunum.

Í 1956 giftist Hans Jacob við Herborg, og tey hava øll árini búð á Biskupsstøð. Foreldrini hjá henni vóru Mattea og Kristian Hansen ella Lamba Kristian, sum hann varð nevndur í Klaksvík. Kristian var ættaður av Kinn í Lamba, og Mattea var úr Uttarstovu í Mikladali.

Herborg og Hans Jacob eiga seks børn: Kristian Martin, Henry, Eyðfinn, Rúni, Ingrid og Maibritt. Kristian Martin, Henry, Eyðfinn og Maibritt búgva í Klaksvík, Rúni býr í Havnini, og Ingrid býr í Keypmannahavn.

Tey fyrru árini, tá ið Hans Jacob var í langfarasigling, vóru túrarnir langir. Hann var fleiri ferðir burturi í meiri enn eitt ár. Tað hevði við sær, at hann eisini var fleiri mánaðir heima, hóast feriutíðin tey fyrru árini ikki var so long, sum arbeiðstíðin var. Hugurin til sjógvin kom eisini til sjóndar, tá ið hann var heima. Hann hevði ikki leingi havt fast undir fótum, tá ið hann fór at flot við verfaðirinum og svágrinum, og tað kom meiri enn so fyri, at hann í styttri skiftum róði út, eitt nú við Hvíthamri.

Hóast tað eru tíggju ár síðani, at Hans Jacob varð pensioneraður, so hevur hann ikki ligið á løtu síðuni. Hann hevur at kalla alla tíðina hoyrt til útróðrarbátin Havsbrún, og hann er framvegis á Stongunum og egnir.

Miðskeiðis í sjeyti árunum keyptu gøtumenn saman við eitt nú fleiri klaksvíkingum rækjubátin Kristinu Logos. Hans Jacob var millum ánararnar. Tá hevði hann eitt skifti farloyvi frá Lauritzen, og sum stýrimaður og skipari á Kristinu Logos kundi hann staðfesta, hvussu stórur framburðurin hevði verið í føroyska flotanum, síðani hann sum júst fyltur fjúrtan fyrstu ferð fór til skips við Kelduni.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Gretha Petersen cand. merc.



Í november 2003 tók Gretha Petersen, sjúkraróktarfrøðingur í Klaksvík, prógv sum cand. merc. í fíggjarstýring. Kandidatritgerð hennara snúði seg um organisasjónsfatan og leiðsluáskoðan viðvíkjandi HS, tað er høvuðsstaðar sjúkrahúsfelagsskapurin í Danmark.

Gretha er 45 ára gomul og starvast í løtuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hon er fødd og uppvaksin í Klaksvík, dóttir Almu og Mikkjal Lenus Petersen. Eftir loknan realskúla arbeiddi hon á flakavirki eina tíð, og í 1978 tók hon prógv á HF í Klaksvík. Eitt skifti var hon gongsgenta á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og í 1978 tók hon handelsmedhjælpereksamen.

Í 1981 fór hon niður á Københavns Amts Sygeplejeskole i Glostrup at lesa til sjúkrasystir og varð hon útlærd í 1984, og í 1989 tók hon Sygeplejefaglig Diplomeksamen við sergrein í leiðslu. Í 1996 tók hon prógv sum civiløkonom við Handilsháskúlan í Keypmannahavn.

Meðan Gretha hevur lisið á HHK, hevur hon starvast sum sjúkrasystir á hjartadeplinum á Ríkissjúkrahúsinum.

### Prógv sum dementsamskiparar



Hesar 18 hava lokið útbúgving sum demenssamskiparar og fingu tann 11. februar 2004 prógv handað á Hotel Vágum

Ovast frá vinstru: Kristbjørg Toftegaard, Jónvør Christiansen, Margaret Johannesen, Kirstin Jensen, Kristbjørg Petersen, Halldis Joensen, Arnleyg í Hjøllum Hentze, Majbrith H. Reynskor, Ester Husgaard, Johanna I. Olsen.

Niðara rað frá vinstru: Poula Sørensen, Unna Næs Petersen, Heidi Hansen, Erna Háberg, Elin Enni, Súsanna Lenvig, Erna Olsen, Haldis Jensen

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Poul Wang**

(Pól í Soylgørðum)

fyrrverandi bóndi í Kaldbak og Hoyvík, doyði leygardagin tann 14. februar, 95 ára gamal.

Jarðarferðin verður týsdagin tann 17. februar kl. 14.00 úr Vesturkirkjuni.

**Elsebeth Christina**
**Eyðun, Zakarias, Sølvá, Hanus og Mourits**

Tey, sum vilja minnast Pól í Soylgørðum, kunnu geva Kaldbaks kirkju eina gávu.

### Dagurin

**17. februar. Finandus,** deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

## Sangløta á Vága Floghavn




*Teir sum manna kvartettina eru: f.v. Torkil Mørkøre, Petur Vitalis, Jóhan Páll Joensen og Jógvan Høj*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Leygarkvøldið 14. februar var skipað fyri sangløtu á kafeteria á Vága Floghavn. Á skránni var felagssangur, kvartettsangur, filmbrot, dramaleikur og tala. Yngra kvartettin í Betesda í Klaksvík og samkoman Kedron í Sørvági skipaðu fyri løtuni**

Tá friður hevði lagt seg yvir Vága Floghavn leygarkvøldið, møttu úti við 300 fólk til eina sangløtu, sum byrjaði kl. 21.00.

Yngra kvartettin í Betesda í Klaksvík hevur tikið fólk við storm, tá tað snýr seg um góðan andaliga sang. Í Ítróttarhøllini í Klaksvík savnaðu teir umleið 800 fólk. Eisini hava sungið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og í Ebenezer í Havn.

Nú teir vóru á Vága Floghavn, møttu úti við 300 fólk. Talan var um eitt hugnakvøld við nógvum felagssangi, kvartettin sang fleiri sangir og ein dramaleikur bleiv sýndur fram. Eisini var filmbrot úr nýggja Jesus-filminum og tala. Teir sum manna kvartettina eru: Torkil Mørkøre, Petur Vitalis, Jóhan Páll Joensen og Jógvan Høj. Við sær høvdu teir eisini gittar- og trummuspælarar.



*Dramaleikur á Kafeteria á Flogvøllinum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*